# Hann ger tað aftur í dag

**Barrack Obama hevur lagt Hillary Clinton langt aftur um seg í New Hampshire , og nú fær hann líka stóra undirtøku í øllum USA sum hon**

Hann spreingir mørk í amerikonskum politikki, sigur Colin Powell.

Fyri tveimum mánaðum síðani lá Barrack Obama 20 prosentstig aftan fyri Hillary Clinton millum teir skrásettu demokratarnar í New Hampshire, men í dag er hann sjey prosentstig framman fyri hana.

Millum teir óheftu veljararnar er munurin uppaftur nógv størri. Sambært CNN fær Barrack Obama 41 prosent av teimum óheftu demokratisku atkvøðunum, meðan Hillary Clinton einans fær 24 prosent.

Í síðstu viku vann Barrack Obama uppstillingarvalið í Iowa, og sigurin har hevur av álvara givið honum undanvind kring alt USA. Ein kanning, sum Gallup hevur gjørt fyri blaðið USA Today, vísir, at av teimum demokratisku veljararunum styðja 33 prosent Hillary Clinton og onnur 33 prosent barrack Obama. Tað merkisverda er, at fyri trimum vikum síðani var Hillary Clinton 18 prosentstig frammanfyri.

Kanningin hjá Gallup umfatar eisini tey republikonsku valevnini, og av teimum liggur Mike Huckabee fremstur við 25 prosentum, meðan Rudolph Giuliani og John McCain fáa ávikavist 20 og 19 prosent.



*Barrack Obama stendur til at vinna greiðan sigur í New Hampshire í dag*

# Barrack Obama spreingir mørk í USA

**Fyrrverandi uttanríkisráðharrin heldur ikki, at húðaliturin hjá Barrack Obama eigur at fáa pláss í valstríðnum**

Colin Powell, fyrrverandi amerikanskur verjuovasti og seinni uttanríkisráðharri, sigur seg vera fegnan um ta veksandi undirtøkuna hjá Barrack Obama. Powell heldur, at amerikanska fólkið eigur at njóta løtuna og vísir á, at senatorurin úr Illinois er í ferð við at gera tað, sum eingin helt, at ein afroamerikanari kundi gera.

- Hann stillar ikki upp, tí hann er svartur, men tí at hann ætlar sær at verða amerikanskur forseti. Vit eiga at uppfata Barrack sum ein politikara, sum er svartur, og ikki sum eitt svart forsetavalevni, segði Colin Powell við sjónvarpið PBS í gjár.

Summir amerikanarar hava sagt, at barrack Obama er ikki nóg myrkur. Pápi hansara er úr Kenya og mamman er hvít úr Kansas í USA. Men tað hevur ongan týdning, sigur Colin Powell.

- Tað er nakað verri slutur at siga, at Barrack ikki er nóg myrkur, sigur fyrrverandi verjuovastin og uttanríkisráðharrin.

## FAKTA um New Hampshire

Sleit sambandið við bretar í januar í 1776 og var ein av teimum 13 statunum, sum grundløgdu USA. Er í landnyrðingspartinum av landinum.

| | |
|---|---|
| **Stødd:** | 24.214 ferkilometrar |
| **Fólkatal:** | 1.236.000 |
| **Høvuðsstaður:** | Concord |
| **Størsti býur:** | Manchester |


*Colin Powell heldur, at Barrack Obama er í ferð við at spreingja mørk í amerikonskum politikki*
*(Mynd: Polfoto)*

# McCain aftur í oddinum


*John McCain heilsar upp á ein av sínum republikonsku kappingarneytum, fyrrverandi borgarstjóran í New York, Rudolph Giuliani*

**Tann 71ára gamli John McCain sær út til at vinna republikanska valið í New Hampshire**

Allastaðni bíða fyrrverandi Vietnam-hermenn eftir at sleppa at tosa við tann 71 ára gamla senatorin úr Arizona, sum sjálvur sat fangi í fimm ár í Norðurvietnam. Soleiðis er eisini í New Hampshire, har McCan heilt óvæntað vann á George W. Bush fyri átta árum síðani.

Hesaferð er hann eisini í oddinum í New Hampshire. Sambært teirri seinastu kanningini hjá CNN fær McCain 31 peosent av teimum republikonsku atkvøðunum, meðan 26 prosent ætlandi fara at atkvøða fyri Mitt Romney.

Sum gamal hermaður og krígsfangi ger John McCain nógv burtur úr krígnum í Irak og bardaganum ímóti yvirgangi.

- Vit gera framstig í Irak. Okkara hermenn gera eitt stórt arbeiði fyri teg og fyri meg, segði hann á seinasta valfundinum í New Hampshire. Eygleiðarar har halda, at hann hevur fyrireikað seg betur til valstríðið hesaferð enn fyri átta árum síðani. Kanningar, sum umfata alt USA, vísa eisini, at hann er tað best umtókta valevnið hjá republikanarunum.